Fylgiskjal 31

Kommunufelagið

Almannamálaráðið
Eirargarður
100 Tórshavn

Dagfesting
14. januar 2020

Okkara j.nr.
18/02936-4

Málsviðgeri
Jóhan Lamhauge

Tygara j.nr.
17/0644

**Viðv.: hoyringarskrivi um vælferðarlógina v.m.**

Kommunufelagið skal hervið koma við viðmerkingum til lógaruppskot um nýggja vælferðarlóg v.m., ið er sent felagnum til hoyringar Tollaksmessudag 2019.

Í teldupostinum frá Almannamálaráðnum varð samstundis boðað frá, at tað sum varð sent til hoyringar, var uppskot til løgtingslóg um almannatrygd og vælferð (vælferðarlógin) og uppskot til løgtingslóg um tvingsil og onnur inntriv í sjálvsavgerðarrættin (tvingsilslógin) og at ongar innihaldsligar broytingar eru gjørdar í fylgilógunum til hesar báðar høvuðslógir, t.e. í uppskotunum um broyting í løgtingslóg um heimatænastu og eldrarøkt v.m., og í uppskotunum um barnavernd og kærunevnd og í almannapensjónslógini, síðani uppskotini vórðu løgd fram seinast. Tí eru tey uppskotini ikki send til ummælis aftur.

Samanlagt má sostatt staðfestast, at samlaði Vælferðarpakkin verður lagdur fram aftur í Løgtinginum, tó við ávísum tillagingum, sum sitandi landsstýri nú hevur gjørt.

Kommunufelagið skilir støðuna soleiðis, at tey lógaruppskot, ið nú eru send til hoyringar, eru broytingar til tey lógaruppskot, sum vórðu løgd fram í Løgtinginum á heysti 2018 sum Vælferðarpakkin. Kommunufelagið gjørdi viðmerkingar til hendan Vælferðarpakkan við hoyringarskrivi, dagfest 14. september 2018. Flestu av prinsipiellu viðmerkingunum eru framvegis aktuellar og tí verður fyrra hoyringarskrivið eisini hjálagt hesum skrivi.

Sum Kommunufelagið eisini visti á í fyrra hoyringarskrivinum, so tekur felagið undir við, at forsorgarøkið verður dagført við nýggju vælferðarlógini. Sæð í ljósinum av, at talan framvegis er um ein og sama samlaða vælferðarpakka, hevur tað fyri kommunala geiran tó størri týdning at umrøða tær broytingar, sum verða gjørdar í lóg um heimarøkt og eldratænastu, sum varð lagt fram sum løgtingsmál nr. 135/2018. Í viðmerkingunum til broytta lógaruppskotið (løgtingsmál nr. 135/2018) sæst, hvussu Almannamálaráðið hevur fyrihildið seg til viðmerkingar frá teimum, sum hava givið hoyringarsvar, herundir eisini viðmerkingarnar frá Kommunufelagnum, sum settar fram í nevnda skrivi frá 14. september 2018.

Hóast ávísar tillagingar eru gjørdar í lógaruppskotinum um heimatænastu og eldrarøkt samsvarandi viðmerkingunum frá Kommunufelagnum, so heldur Kommunufelagið yvirskipað framvegis fast við sjónarmiðið um, at tær broytingar, sum skulu gerast í lóggávuni, sum skipar uppgávur og tænastur á eldraøkinum, skulu vera úrslit av eini skipaðari og samskipaðari eftirmeting av eldraøkinum. Hetta ger seg ikki minst galdandi nú í 2020, tá eftirmetingin er ein

lógarásett skylda sambært § 22 í eldralógini, hvørs orðing er soljóðandi: *"Henda løgtingslóg skal endurskoðast 5 ár eftir, at lógin er sett í gildi. Hetta fyri at meta um, hvørt lógin virkar eftir ætlan, ella um broytingar skulu gerast í skipanini."*

Í viðmerkingunum frá Trivnaðarnevndini til broytingaruppskot, har § 22 varð sett inn í lógina, sæst somuleiðis fylgjandi:
*"Løgtingslógin skal endurskoðast 5 ár eftir, at lógin er sett í gildi. Ætlanin er, at arbeiðið við at endurskoða skipanina skal byrja 5 ár eftir, at lógini er sett í gildi. Hetta fyri at meta um, hvørt lógin virkar eftir ætlan, ella um broytingar skulu gerast fyri at betra um skipanina. Endurskoðanin skal fara fram í samstarvi við kommunufelagið og møguligar aðrar partar í málinum.*

Sum heild er Kommunufelagið av teirri fatan, at broytingar og tillagingar í lóggávuni annars sum viðvíkja kommunala geiranum, eiga at fara fram í neyvum samstarvi og samskifti við kommunala geiran, hetta tí at ein slík tilgongd, sum byggir á samstarv millum landsmyndugleikar (løgting og landsstýri) og kommunalar myndugleikar (kommunustýri og kommunalar fyrisitingar) eigur at geva eitt betri lóggávuarbeiði og borgarum eina betri tænastu.

Kommunufelagið fer tí við hesum at heita á landsstýrið um at steðga á við broytingunum í eldralóggávuni, til eftirmetingin av eldraøkinum er gjørd, og meðan bíðað verður eftir eftirmetingini, gera samsvarandi neyðugar tillagingar í vælferðarlógini, soleiðis at hendan kann fara í tingið, óheft av eftirmetingini av eldraøkinum.

Kommunufelagið fer tó fyri góðan ordan skuld at nýta høvið at gera fylgjandi viðmerkingar til broytta uppskotið um lóg um heimatænastu og eldrarøkt (soleiðis sum hetta er lagt fram undir løgtingsmáli nr. 135/2018):

Kommunufelagið kann staðfesta, at ætlaða broytingin í § 10 er slept, soleiðis at landið framvegis hevur ábyrgd at veita tænastur til fólk sum ikki eru fólkapensjónistar.

Hinvegin staðfestir Kommunufelagið tíverri eisini, at landsstýrið heldur fast við at ætlanina at broyta § 14 í lógini, soleiðis at røktarheim nú skulu hýsa persónum við varandi sjúku, ið er í menning og gongur afturá, og sum hava tørv á hjálp og røkt alt samdøgrið. Júst § 14 stk. 2 er í dag eitt ógreitt markamót, og verða markamótini tíverri ikki loyst við hesi ætlaðu broytingini.

Almannamálaráðið sigur, at broytingarnar eru samsvarandi avgerðum frá Markamótsnevndini. Til hetta er at viðmerkja, at avgerðirnar hjá Markamótsnevndini eiga at innganga sum virðismikið grundarlag undir eftirmetingini av eldraøkinum, men eru sum so ikki egnaðar at brúka beinleiðis sum grundarlag, tí at grundarlagið undir arbeiðnum hjá Markamótsnevndini ( § 14 stk. 2 í eldralógini) er ófullfíggjað. Markamótsnevndini bera týðiligt brá av, at tær eru útfyllandi og leitandi, tí lógargrundarlagið av fyrstan tíð ikki var væl frágingið, ella at neyðugar politiskar diskussiónir ikki blivu gjørdar lidnar áðrenn útleggingina. Tað er hetta arbeiði sum land og kommunur í felag mugu gera í sambandi við eina eftirmeting.

Fyri góðan ordan skuld vil Kommunufelagið tó gera vart við, at Markamótsnevndin tænir sínum endamáli og ti skal varðveitast.

Avgerðirnar hjá Markamótsnevndini, sum nevndin hevur tikið sambært § 14 stk. 2, hava hildið seg til at meta um, nær talan er um heilt serligt føri.

Tann 6. desember 2019 kom Markamótsnevndin við seinastu avgerðini um tulking av § 14 stk. 2 og hendan avgerðin brýtur, eftir Kommunufelagsins fatan, heilt við fyrru avgerðirnar. Málið snúði seg um eina 58 ára gamla kvinnu sum hevði diabetis typu 1 frá ungum aldri, men orsakað av vánaligari regulering av sjúkuni, var vorðin røktarkrevjandi. Markamótsnevndin sigur soleiðis í niðurstøðuni í málinum:

*"Sum nevndina tulkar lógargrundarlagið, er tað tískil ikki sjúka av ávísum slagi ella bara sjúka, sum vanliga rakar eldri menniskju, ið einans kann føra til, at persónur undir 67 ár kemur undir § 14 stk. 2 í lógini um heimatænastu, eldrarøkt v.m. Heldur er viðkomandi, at ein røð av sjúkum kunnu gera persónar undir 67 røktarkrevjandi á ein samanlíkniligan hátt við persónar yvir 67 ár, sum eru viknaðir av aldri og aldursrelateraðum sjúkum."*

Við hesi seinastu niðurstøðuni hjá Markamótsnevndini er enn meira ógreitt, hvørji nú kriteriu eru galdandi, tí nú er talan um eina røð av sjúkum, og sum ikki einans raka eldri fólk, og sum gera fólk røktarkrevjandi, sum kunnu gerast til serlig føri eftir § 14 stk. 2.

Kommunurnar hava staðfest, at tað sum upprunaliga var ætlað til at vera avmarkað til heilt serlig (einstøk) føri, nú er blivið til heilar málbólkar av sjúkudiagnosum – og enn tá, eftir seinastu tulkingina hjá Markamótsnevndini, kann vavið av møguligum sjúkudiagnosum ikki avmarkast sambært galdandi lóggávu og heldur ikki sambært ætlaðu broytingini.

Kommunurnar kunnu als ikki góðtaka hesa gongdina og tað er ikki fyri at lasta Markamótsnevndini, sum noyðist at taka støðu á einum óneyðuga ógreiðum lógargrundarlagi. Seinasta avgerðin hjá Markamótsnevndini vísir týðiliga, at tørvur er at fáa eftirmett eldraøkið og fáa broytt, tillagað og nágreina lógargrundarlagið.

Sum konsekvens av at § 14 verður broytt, verður í løgtingsmál nr. 135/2018 skotið upp at broyta § 12, soleiðis at heimild verður at veita ansingarsamsýning til fólk at ansa persóni undir fólkapensiónsaldur heima, sum hevur varandi sjúku, sum er í menning og gongur afturá og sum hevur tørv á hjálp ella røkt alt samdøgrið. Broytingin í § 12 samsvarar als ikki við upprunaligu ætlanina við § 14 stk. 2, har reglan er, at í heilt serligum føri kann persónur undir fólkapensiónsaldur frá *búpláss* á røktarheimi – í veruleikanum sum einasta og seinasta loysnin. Um viðkomandi borgari er kandidatur til at blíva ansaður heima, er neyvan talan um heilt serlig føri. Kommunufelagið kann tí ikki góðtaka ætlaðu broytingina í § 12.

Eitt annað týdningarmikið evni, ið Kommunufelagið vísti á í seinasta hoyringarskrivi var, at demensøkið sum heild er eitt av teimum heilsuøkjum, sum verður mett at vera ein stór hóttan undir heilsubúskapinum í altjóða høpi og sannlíkt í Føroyum, og tí eisini ein hóttan undir eldraøkinum.

Almannamálaráðið sæst ikki rættiliga at hava fyrihildið seg til hendan hóttandi samfelagstrupulleika, sum er størri enn diskussiónin um verandi ábyrgdarbýti millum land og kommunur. Kommunufelagið kann tó staðfesta, at Almannamálaráðið í viðmerkingum til ætlaðu broytingina í eldralógini (í løgtingsmáli nr. 135/2018 á síðu 18, undir yvirskriftini dagtilhald og umlætting) sigur, at:

*"Demenstænastur verða lýstar og greinaðar saman við Kommunufelagnum í sambandi við, at løgtingslóg um heimatænastu, eldrarøkt skal endurskoðast. Støða verður tá tikin til, um aðrar tillagingar skulu gerast í lóggávuni enn tær, sum framdar verða í hesum uppskotinum og um tørvur er á at broyta fíggingarleistin."*

og sær Kommunufelagið fram til at fara undir hetta arbeiði í felag við landsmyndugleikarnar.

Umframt omanfyri standandi viðmerkingar viðvíkjandi ætlaðu broytingunum í eldralógini, fer Kommunufelagið at viðmerkja fylgjandi, serstakt til § 63 í uppskotinum til vælferðarlóg:

Í lógaruppskotinum (løgtingsmál nr. 127/2018) sæst, at aftaná viðmerkingarnar frá Kommunufelagnum til upprunaliga uppskotið, er ásetingin broytt og nágreinað, soleiðis at

*"**§ 63.** Landið heldur útreiðslurnar sambært hesi løgtingslóg.*
*Stk. 2. Kommunurnar afturrinda landinum tær útreiðslur, ið standast av, at:*
*2) Almannaverkið veitir stuðul til bústaðarbroyting sambært § 27 til persón í fólkapensjónsaldri vegna vantandi bupláss sambært § 14, stk. 1 í løgtingslóg um heimatænastu og eldrarøkt v.m."*

Kommunufelagið er framvegis av teirri fatan, at henda áseting fellur heilt uttan fyri meginregluna um greitt ábyrgdarbýti millum land og kommunur og skilir Kommunufelagið als ikki endamálið við at Almannaverkið yvirhøvur skal hava heimild at játta bústaðarbroytingar til fólkapensiónistar orsakað av at hesi ikki (enn) hava fingið játtað bupláss á røktarheimi. Ásetingin byggir á eina misskiljing av kommunala sjálvræðinum, tí tað er kommunustýrið, ið einsamalt hevur ábyrgd av og rætt at prioritera við kommunalum peningi – harundir eisini um fólk eru á bíðilista til tænastur - og heimildin hjá Almannaverkinum at játta bústaðarbroytingar, til fólk sum bíða eftir kommunalum buplássi, og síðani krevja endurgjald frá viðkomandi kommunu, er eitt beinleiðis inntriv í kommunala sjálvræði.

Kommunufelagið kann ikki góðtaka hetta og krevur at hesin parturin av ásetingini verður tikin burtur.

--oOo--

Samanumtikið fer Kommunufelagið at heita á Almannamálaráðið at bíða við at fremja nakrar broytingar í lóggávugrundarlagnum á eldraøkinum, til lógarásetta eftirmetingin er gjørd. Tó vil Kommunufelagið samstundis gera vart við, at felagið onki hevur at viðmerkja til, at vælferðarlógin verður send í løgtingið – tó tillagað til soleiðis, at vælferðarlógin kann samtykkjast, uttan at neyðugt er við fylgibroytingum í eldralóggávuni, áðrenn eftirmetingin av eldraøkinum er gjørd.

Vegna Kommunufelagið

Dennis Holm, formaður

Eyðun Christiansen, stjóri

Kommunufelagið

Almannamálaráðið
Eirargarður
100 Tórshavn

Dagfesting
14. september 2018

Okkara j nr
18/02936-3

Málsviðgeri
Jóhan Lamhauge

Tygara j nr
17-00644 v.fl

**Viðv.: Hoyringarskrivi um vælferðarpakkan**

Kommunufelagið skal hervið koma við viðmerkingum til lógaruppskotið um nýggja vælferðarlóg, ið er sent út til hoyringar saman við ymsum øðrum lógarbroytingum sum fylgja av vælferðarlógini.

Yvirskipað sæð fegnast Kommunufelagið um, at landsstýrið raðfestir at dagføra og gera neyðugar broytingar í lógargrundarlagnum undir vælferðartænastum hjá landi og kommunum og samstundis at styrkja um rættartrygdina hjá borgarum sum fáa tænastur og starvsfólki, ið veita hesar tænastur.

Hinvegin, um hugt verður nærri at fyriliggjandi uppskotunum sæst, at hóast høvuðsendamálið við vælferðarpakkanum, serliga vælferðarlógini, er at avloysa gomlu forsorgarlógina, so kemur heilt týðiliga til sjóndar av avleiddu lógarbroytingunum í t.d. lóg um heimatænastu og eldrarøkt v.m., at broytingarnar í praksis koma at hava eina nógv størri og víðari ávirkan á kommunurnar, enn tað, ið framgongur av viðmerkingunum til uppskotini.

Landsstýrið setti nakað herfyri sjøtil á at eftirmeta eldraøkið, herundir bæði lógina um samstørvini, innihaldið í tænastum á eldraøkinum, avgreiðslu av markamótum, og ikki minst spurningin um fígging av eldraøkinum. Hetta eftirmetingararbeiði er júst byrjað.

Tí undrar tað stórliga, at markamótini nú einsíðugt frá landsstýrisins síðu verða avgreidd sum ein partur av og ein avleiðing av nýggja vælferðarpakkanum, og ikki sum úrslit av eftirmetingini.

Markamótini - í praksis serliga markamótini millum Almannaverkið og kommunala geiran – fyltu rættiliga nógv fyrstu tíðina eftir at eldraøkið varð lagt út til kommunurnar at umsita. Markamótsnevndin hevur leypandi tikið nakrar avgerðir, sum á ein greiðan hátt hava gjørt upp við nøkur av ivamálunum í markamótum millum forsorgarlógina og eldralóggávuna, og hava partarnir í skipanini síðani skipað seg í samsvari við hesar avgerðir.

Kommunufelagið hevur sum so ikki nakað at viðmerkja til, at avgerðirnar hjá Markamótsnevndini verða kodificeraðar í lóggávu, men fortreytin fyri hesum er sjálvsagt, at tey uppskot um lógarbroytingar, ið verða løgd fyri tingið, eisini eru í samsvari við avgerðirnar hjá Markamótsnevndini.

Kommunufelagið kann tíverri staðfesta, at so er ikki.

**R. C. Effersøesgøta 26 · FO-100 Tórshavn**

**Tlf. +298 302480 · T-postur: kf@kf.fo · Heimasíða: www.kf.fo**

Ynskir landsstýrið at avgreiða markamótini øðrvísi, enn samsvarandi avgerðunum frá Markamótsnevndini, so eigur hetta at verða gjørt við tingingum við kommunala geiran, á einum grundarlagi, har viðkomandi fakligar metingar eru gjørdar av, hvussu borgarin fær bestu tænastuna, hvar uppgávan verður loyst best fakliga, og ikki minst, eini greining av, hvussu økið skal fíggjast, bæði nú og í mun til, hvat metingar og framrokningar vísa, hvussu økið kemur at síggja út í framtíðini.

Vælferðarpakkin inniheldur hesi uppskot:

1. Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um heimatænastu og eldrarøkt v.m.
2. Uppskot til løgtingslóg um almannatrygd og vælferð
3. Uppskot til løgtingslóg um tvingsil og onnur inntriv í sjálvsavgerðarrættin
4. Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um barnavernd
5. Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um kærunevnd í almanna- og heilsumálum

**1. Broyting í lóg um heimatænastu, eldrarøkt v.m. (markamót)**

Í uppskotinum sæst greitt, at eitt av endamálunum við lógarbroytingini er at gera eitt øðrvísi uppgávubýti millum geirarnar, enn avgerðirnar frá Markamótsnevndini leggja upp til.

**Búpláss og aðrar tænastur til fólk undir 67**
Markamótsnevndin hevur tikið avgerðir um at fólk undir 67, ið eru røktarkrevjandi alt samdøgrið og sum hava ávísar diagnosur (serliga demens og Alzheimers) nevndar í viðmerkingunum til § 14 stk. 2 og har sjúkan er progressiv og degenererandi, eiga at fáa bútilboð frá kommununum.

Kommunurnar hava rættað seg eftir hesum avgerðum.

Í avgerðunum frá Markamótsnevndini eru nevnd ávís kriteriu fyri, hvørjir borgarar koma undir § 14 stk. 2. Hesi kriteriu eru, at talan er um borgara sum er røktarkrevjandi alt samdøgrið, og sum hevur eina sjúku sum er progressiv og degenererandi og sum eldri fólk vanliga fáa.

Uppskotið broytir uppá uppgávubýtið, tí nú er tað ikki longur ein treyt, at talan er um sjúku, sum er aldurstreytað, men um fólk við sjúkum, sum eru progressivar og degenererandi, sum eru røktarkrevjandi alt samdøgrið.

Í viðmerkingunum undir pkt. 1.4 á síðu 8 sæst, at málbólkurin er m.a. fólk við Alzheimers, demens og sclerosu á øðrum stigi. Serliga orðingin "m.a." leggur upp til, at tað framvegis er ógreitt, hvønn málbólk talan í veruleikanum er um. Neyðugt er, at støða verður tikin til í lógini,

hvørjar sjúkur eru at meta sum progressivar og degenererandi í lógarinnar týdningi og tí eru fevndar av ábyrgdini hjá kommunala geiranum, og at hesar verða positivt nevndar í lógartekstinum. Kommunurnar hava ringar royndir av ásetingum, sum eru flótandi, tí hóast ætlanin møguliga hevur verið at ásetingarnar skulu tulkast breitt, so eru royndirnar, at sektorábyrgdin verður ógreið og borgarin dettur niðurímillum, meðan myndugleikarnir stríðast um ábyrgdina.

Um broytingin í § 14 verður hildin saman við broytingini í § 10 sæst, at tað fyri so vítt er líkamikið at gera skilnað millum búpláss og aðrar tænastur, tí í uppskotinum til § 10 er ásett, at kommunurnar nú eisini skulu veita somu tænastur til borgarar sum eru undir 67 ár og sum hava eina sjúku sum er progressiv og degenererandi.

Í mun til dagtilhald og umlætting til fólk undir 67 ár, tók Markamótsnevndin avgerð um, at Almannaverkið hevði til uppgávu at veita dagtilboð og umlætting til fólk undir 67 ár við demensi o.l.

Sum sæst av broytingini í § 10 og viðmerkingunum, so er ikki talan um í lóg at staðfesta avgerðina hjá Markamótsnevndini. Tí sambært uppskotinum er málbólkurin undir 67 ár ikki longur avmarkaður til fólk sum eru røktarkrevjandi alt samdøgrið (og sum tí krevja búpláss), men er ætlanin nú, at kommunurnar somuleiðis skulu veita allar tær tænastur, sum tær veita fólkapensjónistum, til fólk sum eru heimabúgvandi og sum hava sjúku, ið er progressiv og degenererandi.

Fyriliggjandi uppskot til broytingar í lóg um heimatænastu leggur upp til, at tað eru kommunurnar sum framyvir skulu hava ábyrgdina av øllum demensøkinum, soleiðis at hetta økið burturav verður flutt frá landi til kommunurnar.

Soleiðis sum skotið er upp at broyta § 10, er lagt upp til eina munandi broyting í málbólkinum sum eldraøkið í dag hevur ábyrgd av samsvarandi útleggingini og tí eisini eina munandi broyting í teimum fyritreytum, sum fíggingin av eldraøkinum er gjørd eftir. Málbólkurin fyri kommunalum tænastum, sum sambært galdandi lóggávu er fólkapensjónistar, verður við hesum uppskotinum ikki avmarkaður til annað enn øll fólk við varandi sjúkum, sum eru progressivar og degenererandi. Harumframt verður vavið av tænastum eisini víðkað, soleiðis at kommunurnar nú eisini skulu veita enn fleiri tænastur til ein munandi størri málbólk.

Upplýst verður í uppskotinum, at Almannaverkið brúkar 2,4 mió. til dagtilhald o.a. árliga. Onki verður tó sagt um, hvørt henda fígging, sum Almannaverkið í dag hevur, fylgir við til kommunurnar í sambandi við broytingina. Heldur einki verður sagt um, í hvønn mun henda upphædd nøktar reella tørvin. Tørvurin er als ikki lýstur í uppskotinum.

Demensøkið er eitt av teimum heilsuøkjunum, sum verður mett at vera ein stór hóttan undir heilsubúskapinum. Í altjóða Alzheimer-frágreiðing frá 2016, sum Alzheimer's Disease

International (ADI) stendur fyri, kann staðfesast, at í 2015 vóru 47 mió. tilfeldi av demens á heimsplani og framskrivingar vísa, at hetta tal nærum trífaldast og økist til 131 mió. í 2050. Fíggjarligu avleiðingarnar av demenssjúkum økjast samsvarandi ógvusliga. Tað eru ongar ábendingar um, at hetta rákið verður øðrvísi í Føroyum enn aðrastaðni.

Frágreiðing er at finna á https://www.alz.co.uk/research/WorldAlzheimerReport2016.pdf

Harnæst skal viðmerkjast, at hóast demens søguliga hevur verið at roknað sum ein aldursrelaterað sjúka, so er sjúkan ikki aldurstreytað. Alsamt fleiri yngri fólk fáa demens. Hesi fólk eru ofta væl fyri fysiskt, og gevur hetta avbjóðingar í mun til, hvørjar ymsar tænastur hesi fólk hava tørv á. Demens fevnir um eina rúgvu av sjúkustøðum, har umleið 200 ymiskar sjúkur kunnu viðføra demens ella onnur kognitiv órógv í heilanum. Hetta økið er tí í líka stóran mun ein trupulleiki fyri heilsuverkið, sum tað er fyri eldraøkið. Eldraøkið sum kommunurnar hava yvirtikið, er als ikki útgjørt ella búgvið til at taka ímóti eini so stórari framtíðar avbjóðing – og verandi fíggingarleistur undir eldraøkinum ikki er haldbarur við núverandi uppgávum – og tí enn minni haldbarur at taka við nýggjum avbjóðingum.

Neyðugt er tí at taka henda samfelagstrupulleika í størsta álvara. Uttan mun til, um partarnir eru ósamdir um, hvørt alt ella partar av demensøkinum varð lagt út til kommunurnar í 2015, so eigur fokus nú at vera á, í hvørjum sektori uppgávan verður loyst best eins og fokus má vera á, at kommunali geirin - útfrá verandi fortreytum við starvsfólkahópi og fíggingarleisti - ikki er førur fyri at røkja hesa nýggju uppgávuna.

Tískil mælir Kommunufelagið til at taka demensøkið sum heild burturúr fyriliggjandi uppskotum í vælferðarpakkanum og fara undir veruligar tingingar við avvarðandi partar um, hvussu henda avbjóðing skal loysast í verki og hvussu hetta skal fíggjast, og síðani eftirfylgjandi at gera neyðugar tillagingar í lógarverkinum.

Harumframt eigur sum heild at vera arbeitt við at regulera økið í mun til borgarar, ið ynskja at flyta frá einum røktarheimi í einum kommunusamstarvi/kommunu ella frá einum stovni undir Almannaverkinum til røktarheim í øðrum kommunusamstarvi/kommunu, har greiða verður fingið á markamótunum millum sjálvsavgerðarrættin hjá borgaranum í mun til rættin hjá myndugleikanum at skipa tilboð og tænastur eftir givnum umstøðum, so sum landafrøðiligum avbjóðingum, logistikki, rakstrarfyrimunum, effektiviteti o.t.

**Heimatænasta og stuðulstænasta**
Kjakið millum kommunala geiran og Almannaverkið um markamótið stuðul/røkt hevur í stóran mun snúð seg um, at kommunurnar duga illa at síggja meiningina í, at borgari, sum í aðra mátar fær stuðul 24 tímar um samdøgrið frá Almannaverkinum, skal hava hjálp frá kommununi til grundleggjandi røkt sum t.d. vask, busta tenn o.t. sum stuðulin eins væl kundi gjørt.

Markamótsnevndin hevur í avgerð staðfest, at tilboð frá Almannaverkinum sum eru

samdøgursfyriskipanir til einstaklingar, eru at meta sum stovnslíknandi tilboð og tí eigur Almannaverkið at veita røktina í tílíkum førum.

Í hesum uppskoti sýnist Almannamálaráðið at ganga ímóti hesi avgerð og heldur fast við uppbýtið, sum kommunurnar og Almannaverkið hava verið ósamdar um. Kommunufelagið mælir staðiliga til, at avgerðin hjá Markamótsnevndini verður fylgd. Í øðrum lagi verður mælt til, at ein meginregla verður gjørd um, at í teimum førum, har talan er um vanliga persónliga røkt, sum persónur uttan serstaka útbúgving kann veita, verður henda veitt sum framhald av einum stuðulstilboði, sum annars verður veitt sama borgara, hetta fyri at fyribyrgja at ov nógv heilsustarvsfólk eru um borgaran og útfrá einum effektivtetsatliti.

**Endurvenjing og viðlíkahaldsvenjing**

Í verandi lóggávu hava kommunurnar heimild at veita endurvenjing og viðlíkahaldsvenjing og insitamentið hjá kommununum er, at fyribyrgja at borgarar blíva meira røktarkrevjandi.

Tað er ógreitt, hvør broytingin í veruleikanum er í mun til í dag, tí kommunurnar kunnu velja at raðfesta tilboðini, herundir eisini viðlíkahaldsvenjing, ella lata vera, innan verandi heimild.

Í tann mun at lógaruppskotið áleggur kommununum eina skyldu at veita borgaranum hesar tænastur – serliga í mun til viðlíkahaldsvenjing, er talan um eina nýggja uppgávu, ið eigur at verða fíggjað og tingingar eiga at fara fram millum land og kommunur um hetta.

Almannamálaráðið eigur at koma við nágreiningum um, hvat broytingin í veruleikanum merkir fyri kommunurnar og borgaran, og hvat hetta hevur at týða fíggjarliga.

Sum nevnt er omanfyri, so er málbólkurin fyri tænastum frá heimatænastuni víðkaður munandi við nýggju orðingini av § 10. Víst verður til generellu viðmerkingarnar um, hvussu farast skal fram tá uppgávur verða álagdar kommununum, herundir at hetta verður gjørt útfrá eini fakligari meting um, hvar økið verður best røkt í mun til tænastuna til borgaran og hvussu økið skal fíggjast.

Bæði í mun til § 14 og § 10 er neyðugt at nágreina málbólkin enn meira, fyri at fyribyrgja at nýggj markamót uppstanda. Kommunufelagið kann ikki góðtaka, at orðingarnar í lóggávuni á eldraøkinum eru so víðar og fevnandi, at tað stórt sæð eingin avmarking er í málbólkinum. Hetta viðførir eina skeiklan millum geirarnar, sum Kommunufelagið kann staðfesta, at kommunurnar hava stríðst við síðan eldraøkið varð lagt út og sum leggur eitt óneyðugt trýst á kommunala geiran.

**Fíggjarligar avleiðingar fyri kommunurnar:**

Sambært uppskotinum hava broytingarnar ikki stórvegis fíggjarliga ávirkan á kommunurnar, tí kommunurnar sjálvar kunnu gera av, hvussu nógv verður játtað til ymsu tilboðini.

R. C. Effersøesgøta 26 · FO-100 Tórshavn

Tlf. +298 302480 · T-postur: kf@kf.fo · Heimasíða: www.kf.fo

Kommunufelagið metir als ikki, at henda upplýsing er nøktandi, tí eingin greining er gjørd av verandi støðu og fíggjarligu avleiðingunum. Hinvegin er heilt greitt, at við uppskotinum verða fleiri uppgávur lagdar á kommunurnar og at hetta kemur at viðføra munandi størri útreiðslur fyri kommunala geiran.

Á stórt sæð øllum teimum økjum, ið eru flutt frá landi til kommunur ígjøgnum tíðirnar, hevur fíggingartørvurin leypandi víst seg at verið munandi størri enn tær metingar, ið hava verið gjørdar í sambandi við at økini hava verið løgd út.

Harumframt kann viðmerkjast, at tað eru fleiri dømir um, at fortreytirnar fyri fíggingini av einum øki, sum verður flutt frá landi til kommunur, verður broytt eftirfylgjandi við teirri avleiðing, at fíggingin ikki røkkur til tørvin. Dømi um hetta er m.a. at kravið um ávíst %-víst inngjald til eftirløn, har kommunur fáa part av forskattingini, varð broytt í ístaðin flutt til samhaldsfasta við teirri avleiðing, at tað manglar peningur í hvørt ár. Annað dømi er pensjónsnýskipanin, ið somuleiðis broytir fortreytirnar, uttan at kommunurnar á annan hátt verða kompenseraðar. Triðja dømi er skattalættin til fyritíðarpensiónistar, sum kostaði kommunala geiranum 25 mió. í mistum skattainntøkum. Hóast landsstýrið hevur givið lyfti um kompensatión, so er hetta ikki avgreitt enn.

Kommunufelagið krevur tí, at nærri útgreiningar verða gjørdar av, hvussu økið kann væntast at síggja út í framtíðini og hvat kostnaðurin verður, umframt at kravt verður at nøktandi fígging fylgir við, í tann mun at kommunur skulu yvirtaka nýggjar uppgávur.

**2. Til uppskot til løgtingslóg um almannatrygd og vælferð (Vælferðarlógin)**

Víst verður til viðkomandi viðmerkingarnar til broyting í lóg um heimatænastu, eldrarøkt v.m.

**Búpláss**

Tað er ógreitt, hvat liggur í orðingini *"um endamálið við varda bústaðnum annars framhaldandi verður rokkið."* Kommunufelagið hevur sæð dømir um at fólk, sum eru vorðin eldri enn 67 ár og sum meginpartin av sínum lívi hava havt bútilboð frá Almannaverkinum, eru farin at søkja um búpláss á eldraøkinum – tí umstøðurnar hjá Almannaverkinum ikki longur vóru nøktandi. Greiða má fáast á, hvat orðingin *"um endamálið við varda bústaðnum annars framhaldandi verður rokkið"* ítøkiliga er ætlað at merkja.

Gerontopsykiatrisk bútilboð verður als ikki nevnt í uppskotinum. Kommunufelagið metir, at persónar við týðandi sálarligum breki eiga at fáa eitt gerontospykiatisk bútilboð, tá teir verða røktarkrevjandi orsakað av ellisbreki ella varandi sjúku og at hesi bútilboð eiga at vera ein landsuppgáva, ið antin má liggja undir Almannaverkinum ella sjúkrahúsverkinum.

Viðvíkjandi nýggja § 14, stk. 2: Hóast móti gjaldi metir Kommunufelagið, at serliga persónar við sálarligum breki og víðfevndum sosialum trupulleikum krevja at hava rundanum seg fólk

við útbúgving innan psykiatriska økið og/ella fólk við námsfrøðiligari útbúgving. Eldraøkið hevur ikki starvsfólk við hesum førleikum.

Viðmerkt verður, at sum er, er bíðilisti til búpláss til borgarar yvir 67 ár í fleiri økjum á eldraøkinum.

**Dagtilhald og umlætting**
Sum viðmerkt er omanfyri, er uppskotið ikki í samsvari við avgerðirnar hjá Markamótsnevndini um hesi markamót.

Um landið ynskir at kommunurnar yvirtaka hesa uppgávu, og skipa eitt øðrvísi býti millum land og kommunur, so eiga tingingar at fara fram um vavið av uppgávuni og figgingina.

Sí viðmerkingar til lógarbroytingar í lóg um heimatænastu, eldrarøkt v.m. omanfyri.

**Heimatænastan hjá kommununum og Stuðulstænastan hjá Almannaverkinum**
Eftir uppskotinum skal heimatænasta veitast øllum heimabúgvandi borgarum, uttan mun til aldur. Um hetta merkir at eisini børn og ung undir 18 ár skulu vera fevnd av heimatænastuni, so er tað nýtt virksemi sum verður lagt til kommunurnar og hevur avgjørt fíggjarligar avleiðingar við sær.

Børn, ið bera brek ella hava fjølbrek og sum hava nógvan stuðul/samdøgursstuðul hava higartil ikki fingið røkt frá heimatænastuni, tí stuðulsfólkið hevur havt hesa uppgávuna.

Mett verður, at markamót í mun til trivnaðartænastur frá Almannaverkinum sambært § 32c í forsorgarlógini og heimatænastuna mugu greinast nærri í hesum sambandi.

**Endurvenjing og viðlíkahaldsvenjing í Almannaverkinum og kommununum**
Í verandi lóggávu hava kommunurnar heimild at veita endurvenjing og viðlíkahaldsvenjing og insitamentið hjá kommununum er, at fyribyrgja at borgarar blíva meira røktarkrevjandi.

Í tann mun at lógaruppskotið áleggur kommununum eina skyldu at veita borgaranum hesar tænastur – serliga í mun til viðlíkahaldsvenjing – er talan um eina nýggja uppgávu, ið eigur at verða figgjað og tingingar eiga at fara fram millum land og kommunur um hetta.

**Viðmerkingar frá Kommunufelagnum til einstakar ásetingar í Vælferðarlógini**
Til § 5 stk. 1 – ásetur, at bert persónur, sum lógliga uppiheldur sær í Føroyum kann fáa veiting sambært lógini. Dømi er um persón sum uppiheldur sær ólógliga í Føroyum, sum eigur eitt barn, hvørs tørvur er fevndur av barnaverndarlógini. Foreldrið hevur ikki rætt til forsorgarhjálp og tískil má barnaverndartænastan, útfrá atliti til tørvin hjá barninum, í veruleikanum rinda forsorgarhjálp til foreldrið. Hetta er ikki ein nøktandi rættarstøða. Her átti ein serstøk áseting

at verið gjørd, sum tryggjaði øllum persónum sum uppihalda sær í Føroyum, eina minstu veiting.

Til § 27 stuðul til bústaðarbroyting
Sí viðmerking til § 63.

Til § 35 Stuðulstænasta
Víst verður til viðmerkingarnar omanfyri um heimatænastu og stuðulstænastu í lógini um heimatænastu og eldrarøkt v.m.

Til § 39
Talan er um eina reglu sum í stóran mun er ein spegling av ásetingini í § 5 í dagstovnalógini, sum skilir ímillum børn við serligum tørvi, sum kunnu integrerast í kommunalu dagstovnaskipanirnar og børn við heilt serligum tørvi, sum Almannaverkið eigur at veita tilboð til.

Kommunurnar eru rættiliga ónøgdar við hvussu § 5 í dagstovnalógini hevur verið umsitin í praksis av Almannaverkinum, tí fatanin er, at eingin reellur skilnaður fer fram millum serligan tørv og heilt serligan tørv, og at kommunurnar fáa álagt at veita tilboð í nógv størri mun enn ætlanin við lógarbroytingini var.

Kommunufelagið arbeiðir við at fáa broytt tulkingina av § 5 í dagstovnalógini og hetta uppskotið er eitt høvi at fáa gjørt vart við ónøgdina og at royna at fáa rætta upp í umsitingini av býtinum millum kommunurnar og Almannaverkið.

Kommunufelagið biður tí um, at Almannamálaráðið tekur neyðug stig til, saman við Mentamálaráðnum, at fáa rætta upp uppá skipanina og greitt markamótini í § 5 í dagstovnalógini, áðrenn henda, eftir Kommunufelagsins fatan, skeiva praksis sambært § 5 í dagstovnalógini, verður endurtikin í § 39 í vælferðarlógini.

Til § 53
Ásetingin áleggur øðrum myndugleikum (t.d. kommunum, eldrasamstørvum, barnaverndum v.m.) at útflýggja allar kravdar upplýsingar til Almannaverkið. Henda ásetingin fer nógv víðari enn ásetingarnar í fyrisitingarlógini um tað sama. Kommunufelagið setir spurnartekin við, um tað er alneyðugt, at Almannaverkið skal hava so víðari heimildir og hvørji atlit tala fyri hesum mótvegis atlitinum at rættartrygdini hjá borgaranum. Hetta framgongur ikki nóg væl av viðmerkingunum.

Til § 63
Undir fíggjarligum avleiðingunum av uppskotinum verður á síðu 60 sagt, at landið heldur útreiðslurnar sambært galdandi forsorgarlóg, og at umleið 40 % av útreiðslunum fara til borgarar yvir 67, og við støði í hesum verður mett, at landið sparir umleið 750 túsund árliga.

R. C. Effersøesgøta 26 · FO-100 Tórshavn

Tlf. +298 302480 · T-postur: kf@kf.fo · Heimasíða: www.kf.fo

Serliga eru tað sparingarnar til bústaðarbroytingar eftir § 27, ið sipað verður til. Kommunufelagið metir ikki, at tað ber til at samanbera skipanina við bústaðarbroytingum við skipanina, har kommunurnar skulu endurrinda Almannaverkinum útreiðslur fyri væntandi barnaansing. Endamálið við reglunum um endurrindan fyri væntandi barnaansing er at tryggja, at nóg mikið av ansingarplássum eru tøk, soleiðis at foreldrini sleppa á arbeiðsmarknaðin. Somu atlit gera seg ikki galdandi, tá talan er um bústaðarbroytingar. Ein fólkapensjónistur hevur ikki nakran inntøkumiss av at bíða eftir einum røktarheimsplássi.

Tann umstøða, at ein borgari t.d. ikki longur kann fara upp á wc á loftinum, merkir ikki tað sama sum at hann verður visiteraður til búpláss.

Ein bústaðarbroyting hjá persóni yvir 67 ár kann merkja, at borgarin kann búgva í egnum heimi í fleiri ár við heimatænastu, dagtilboðum v.m. ella klára seg við minni hjálp frá heimatænastuni.

Kommunan hevur ikki skyldu at útvega ella visitatiónsrætt til íbúðir, ið møguliga høvdu verið meira hóskandi til henda málbólk, soleiðis sum Almannaverkið hevur til íbúðir hjá Bústaðir.

Í mun til sjálvsavgerðarrættin eigur atlit at verða tikið til ynski hjá persóninum um at vera búgvandi í egnum bústaði og eigur hann at hava somu rættindi, hóast aldur, sum onnur, ið hava fingið brek.

Sambært uppskotinum er talan um at flyta eina uppgávu frá landi til kommunurnar, og í tílíkum føri mugu tingingar fara fram um vavið av tí, ið verður yvirtikið og ta fígging, ið skal fylgja við.

Í øðrum lagi sýnast viðmerkingarnar at leggja upp til, at tað framvegis er Almannaverkið sum játtar eina bústaðarbroyting, men kommunurnar skulu gjalda. Hetta kunnu kommunurnar sjálvsagt ikki góðtaka. Vald og gjald skulu fylgjast at.

Um hildið verður fast við, at kommunurnar skulu yvirtaka skylduna mótvegis fólki yvir 67 ár, so eiga kommunurnar eisini at fáa rættin at gera av, um og hvussu tilboðið til borgaran verður veitt, antin við bústaðarbroyting ella á annan hátt.

Mælt verður tó til, at ongin broyting verður gjørd, soleiðis at tað framvegis er Almannaverkið ið metir um og ger av, hvørt bústaðarbroyting verður játtað og Almannaverkið umsitur somuleiðis játtanina, uttan endurrindan frá kommununum.

## 3. Til tvingsilslógina

Kommunufelagið tekur undir við at lóggivið verður um karmarnar fyri at nýta tvingsil í sambandi við útinnan av vælferðartænastum.

R. C. Effersøesgøta 26 · FO-100 Tórshavn

Tlf. +298 302480 · T-postur: kf@kf.fo · Heimasíða: www.kf.fo

Ítøkiliga vísir tað seg tó, at § 13 er ov óneyvt orðað, til at loysa tær avbjóðingar innan eldraøkið, ið fyrikoma í praksis, tá talan er um at flyta borgarar.

Kommunufelagið krevur tó, at § 13 verður nágreinað saman við fakfólki frá eldraøkinum, ið kenna til praktisku avbjóðingarnar, soleiðis at trygd fæst fyri, at ásetingin kemur at tæna sínum endamáli.

## 4. Til broyting í barnaverndarlógini

Broytingarnar í Barnaverndarlógini eru fylgja av nýggju tvingsilslógini.

Kommunufelagið saman við Barnaverndarstovu Føroya metir, at viðmerkingarnar til ásetingarnar um avmarkingar í telefon og internetnýtslu, ikki geva neyðuga vegleiðing um, hvussu hetta skal umsitast í praksis, serliga ikki hvar markið gongur ímillum generella tálman av telefon og internetnýtslu, sum kemur undir hugtakið umsorgan og so eina avmarking, sum er at meta sum inntriv í sjálvsavgerðarrættin.

Viðmerkjast skal somuleiðis, at kritiriini "eyðsýndur vandi" og álvarsamur skaði" ikki eru serliga greið, og tí kann gerast trupult hjá teimum sum skulu umsita hetta í praksis at meta um, nær umstøðurnar eru nóg kvalifiseraðar til at ásetingarnar kunnu nýtast.

Barnarverndarstovan loyvir sær harumframt at viðmerkja, at tað er ein tørvur í Føroyum á einum tilboði um tryggjað stovnspláss (sikret instutionsplads), og tíverri nøktar fyriliggjandi lógaruppskot ikki henda tørv.

## 5. Broyting í løg um kærunevnd í almanna, familju- og heilsumálum

Kommunufelagið hevur ongar viðmerkingar.

--oOo--

Kommunufelagið er altíð sinnað at koma á fund at umrøða og viðgera ítøkiligar viðurskifti og ivamál um tørvur er á tí.

Vegna Kommunufelagið

Dennis Holm, formaður

Eyðun Christiansen, stjóri